

## Stress millum fíggjarfólk

Fleiri enn triðja hvørt starvsfólk innan fíggjarsektorin uppliva symptomir upp á stress, og fleiri enn áttandi hvør hevur heilsuhóttandi symptomir upp á stress. Tað vísir ein spurnarrunda millum 831 limir av Finansforbundet. – Hetta er hægsta stressstig nakrantíð og er ógvuliga álvarsamt, sigur næstformaðurin í Finansforbundet, Solveig Ørteby sum heldur, at fíggjarkreppan hevu røkt um trýstið á einstøku starvsfólkini. Finansforbundet hevur spurt 831 limir um stress. Av teimum svara 37%, at tey uppliva symptomir upp á stress. Hetta er ein munandi øking í mun til meðaltalið fyri líknandi kanningar, sum vórðu gjørdar í 2009, har 32% svaraðu, at tey kendu tekin til stress. Talið á fíggjarstarvsfólki, sum uppliva lívshóttandi symptomir hevur ikki verið hægri enn tað sama, og seinastu kanningar vísa, at 11% siga seg føla rættiliga nógv ella ómetaliga nógv stress. Tað er ógvuliga ræðandi, at hon nógvir av okkara limum kenna seg stressað. Men tað er í veruleikanum ikki so undarligt tá hugsað verður um, at fyritøkurnar seinasta hávltannað árið hava sagt umleið 3.000 fólkum upp, sigur Solveig Ørteby. – Tað merkir púra vist, at onnur skulu renna skjótari fyri at klára uppgávurnar, og samstundis merkir fíggjarkreppan stóra óvissu um, hvat hendir frameftir, sigur Solveig Ørteby við boersen.dk

# ðshóttan

reglu og sakføraranum hjá høvuðsákærda fyri at greiða frá rætta samanhanginum.

Í staðin førdi hann eina søgu fram um, at hann í Tunesia hevði hoyrt, at høvuðsákærdi varð vorðin sjúkur, og tí fegin vildi hava hann (unga mannin) til Føroya at hjálpa sær. Hann hevði eisini tosað við ákærda, og tá hesin hevði sagt honum, at alt gamalt agg var gloymt, var tað eisini nóg mikið til at gloyma alla ræðslu fyri pápabeiggjanum, og hann kom so aftur til Føroya.

### Bróður móti bróðri

Men at málið er torskilt er avgjørt ikki at siga ov nógv.

Bróður høvuðsákærda, sum kom til Føroya við honum 16. juli 2008, kom higar við tí í hyggju, at keypa pizzaria'ið frá bróðrinum. Við í søguna hoyra 135.000 krónur, sum bróður høvuðsákærda segði seg hava havt við til Føroya fyri at gjalda MVG-skuld fyri bróðurin, og pengarnir skuldu ganga inn í keypsprísin.

Tá so brøðurnir báðir vórðu handtiknir, varð hald lagt á hesar pengarnar. Eitt sindur ógreitt var, í hvørjum navni løgreglan legði hald á pengarnar, men tað stutta av tí langa var, at av tí at bróður høvuðsákærda fekk dóm í Føroya Rætti, misti hann starv sítt gjøgnum 12 ár í floghavnini í Kastrup.

Í rættinum fríggjadagin kom fram, at bróðurin nú einki annað visti sær, enn at arbeiða fyri høvuðsákærda, og hetta gjørdi hann í fleiri mánaðir. Uttan løn, pástóð hann.

Av tí at høvuðsákærdi hevði búð ein stóran part av sínum lívi í Føroyum, kendust brøðurnir ikki so væl, men sambært yngra bróðrinum fann hann út av, at høvuðsákærdi kanska ikki var so snjóhvítur, sum hann sjálvur vildi gera seg til.

Hann greiddi frá, at eldri bróðurin var lopin frá lyftinum um, at hin yngri skuldi keypa pizzaria'ið, og sakførarin hjá honum fyrireikar nú eitt borgarligt sakarmál móti høvuðsákærda, tí hesin ongantíð hevur goldið yngra bróðrinum tær 135.000 krónurnar aftur.

Yngri bróðurin læt eisini greinaskrivaran vita, at hann stuðlaði pápasoni teirra heilt og fult, eisini í sambandi við trýstið, tá ungi maðurin gjørdi samrøðuna til Sosialin.

### Hóttanir í rættinum

Men málið í Eystara Landsrætti fríggjadagin skuldi jú hava ein enda og ein dóm, og úrslitð gjørdist, at Landsrætturin staðfesti dómin frá Føroya Rætti. Einasta broytingin var, at tær 135.000 krónurnar, sum løgreglan legði hald á, vóru dømdar at vera ogn hjá høvuðsákærda, men hetta merkir ikki annað, enn at TAKS fær hesar pengarnar.

Til søguna hoyrir eisini, at meðan teir tríggir landsrættardómararnir vóru úti at votera um dómin, uppstóð orðadráttur millum høvuðsákærda og unga mannin, sum hevði vitnað. Hvat sagt varð, bar sjálvandi ikki til at vita hjá sakførarum og ákæra – og hjá miðlafólki fyri tann saks skuld, tí orðadrátturin fór fram á arabiskum.

Men ungi maðurin pástóð, at høvuðsákærdi hevði hótt hann – eftir lívinum – við at siga: »Bíða bara til vit koma heim til Tunesien«.

Bæði sakførarar og ákæri ryktu knyklar í brýr, tí hetta vóru so álvarsligar ákærur at seta fram í sjálvum rættarsalinum, og teir tríggir mæltu unga manninum til at fara úr rættinum, og ungi maðurin so gjørdi.

Málið er so liðugt avgreitt í rættarskipanini – tí tað kann illa hugsast, at kært verður til Hægstarætt – men um hetta fær fylgjur fyri nakran av pørtunum niðri í Tunesien, má bara tíðin vísa.



*Lærarafelagið skilir væl, at mentamálaráðið hevur mist tolið, men felagið vil ikki hava, at kommunurnar fáa skúlan at umsita, tí vandin er stórur fyri øll børnini ikki fara at fáa ein líka góðan skúla*

*Savnsmynd*

# Kommunurnar mugu ikki fáa ræðið á fólkaskúlanum

**Lærarfelagið vil ikki, at fólkaskúlin skal leggjast undir kommunurnar at umsita**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Fólkaskúlin má ikki leggjastundirkommunurnar at umsita.

Tað sigur Føroya Lærarafelag nú Løgtingið í morgin skal viðgera uppskot frá Helenu Dam á Neystabø um umskipanir á fólkaskúlanum.

Í eini viðmerking staðfestir Lærarafelagið, at tað er ógvuliga óheppið, at mentamálaráðið skal hava ábyrgdina av einum parti av skúlanum, men at kommunurnar hava ábyrgdina av einum parti.

– Hetta tvíbýti av ábyrgdini hevur verið sera óheppin, staðfestir læraralfelagið.

– Tað má og skal steðga, staðfestir Lærarafelagið.

Tað eru tey flestu í Løgtinginum og landsstýrinum eisini samd um.

Nógvir politikarar og flestu kommunurnar halda, at einasti mátin at loysa trupulleikan, er at geva kommununum allan fólkaskúlan at umsita.

Men her gongur Lærarafelagið beint ímóti streyminum, tí felagið mælir til at ganga øvugta vegin so at øll umsitingin og øll ábyrgdin verður flutt undir Mentamálaráðið at umsita

– Tá og bara tá, fer at bera til at tryggja javnt skúlatilboð í øllum landinum,

Og tá og bara tá, fer at bera til at skipa landið í skúlaøki, so sum ætlanin er, sigur Lærarafelagið.

– Okkara land er so lítið at einasta rætta má vera at skipa landið undir einum ráði, leggur Lærarafelagið afturat.

### Kommunurnar klára ikki sjálvar

Annars skilir Lærarafelagið væl, at mentamálaráðið hevur mist tolið við ætlanini at umskipa kommunurnar, tí har hendir onki.

Felagið tekur undir við, at landið verður skipað í munandi størri øki enn nú og felagið tekur eisini undir við, at landið verður skipað í sjey skúlaøki, sum vera tey somu sum í seinasta álitinum um kommunalan bygnaði í Føroyum.

Men nýskipanin á kommunuøkinum má skal skal gerast fyrst og so kunnu skúlaøkini skipast, sigur Lærarafelagið.

Men felagið hevur lítið álit á, at kommunurnar klára sjálvar at semjast um samanleggingar.

– Vit duga ikki at síggja nakran sum helst møguleika fyri, at kommunurnar sjálvar fara at finna saman og fara at semjast um, hvør skuli skal verða latin aftur og hvør styrktur.

– Tað hevur ikki borið til higartil, og tað verður sama lagið framyvir. Tí er bara ein loysn og hon er, at Landsstýrið og Løgtingið skera ígjøgnum og fremja kommunureformin fyri 1. januar í 2011.

Tá og bara tá ber til at skipa landið í skúlaøki, heldur Lærarafelagið

Men hóast landið verður skipað í øki og tímajáttanin verður latin hvørjum øki sær, verður framvegis neyðugt, at gera serskipanir fyri Mykines, Fugloy, Dímun og aðrar útoyggjar.

Við vanligari tímajáttan fara økini ikki at megna at halda lív í hesum skúlum, og júst á hesum støðum ber ikki til, at skúlin hvørvur, sigur Lærarafelagið.